## Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 28. november 2025 |
| Mál nr.: | 25/24199-10 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | Skrivið 28. november 2025 til 5. januar 2026 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

# Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

(Eftirlønarviðbót til fólkapensjónistar, sum hava verið fyritíðarpensjónistar og barnaviðbót kann veitast í brotum)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117, frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 5 verður sum nýtt nr. sett:
5) eftirlønarviðbót

**2.** Aftan á § 12 b verður sett:

**§ 12 c.** Eftirlønarviðbót verður veitt fólkapensjónisti, føddur aftan á 30. juni 1958, og sum áður hevur fingið pensjón sambært § 2, stk. 1, nr. 2-5.
*Stk. 2.* Persónur, ið hevur útsett útgjaldið av fólkapensjón sambært §§ 9 a-9 f, hevur ikki rætt til eftirlønarviðbót.
*Stk. 3.* Árlig eftirlønarviðbót verður ásett sum útrokningarupphædd sambært stk. 4 deilt við 15. Útroknaða eftirlønarviðbótin verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.
*Stk. 4.* Útrokningarupphædd er 12% av útgoldnari pensjón sambært § 2, stk. 1, nr. 2-5 síðani 1. januar 2022. Til útrokningarupphæddina hoyra grundupphædd, viðbót, avlamisviðbót og eyka viðbót.
*Stk. 5.* Eftirlønarviðbót verður útgoldin mánaðarliga.

**3.** Í § 15, 2.pkt. verður “§ 10 og” strikað.

**4.** Í § 18, stk. 3 verður aftan á “barna-“ sett: “eftirlønar-,“.

**5.** Í § 20 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
*Stk. 3.* Afturat inntøkuni sambært stk. 1 skal leggjast eftirlønarviðbót sambært § 2, stk. 5, nr. 5, sbr. § 12 c.
Stk. 3-7 verða eftir hetta stk. 4-8.

**6.** Í § 20, stk. 4, sum verður stk. 5, verður “stk. 3” broytt til: “stk. 4”

**7.** Í § 20, stk. 7, sum verður stk. 8, verður “stk. 1-6” broytt til: “stk. 1-7”

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men § 1, nr. 1-2 og 4-7 hava virknað frá 1. januar 2025.
Stk. 2. Persónur, ið hevur fingið játtað barnaviðbót áðrenn henda løgtingslóg kemur í gild, fær viðbót eftir higartil galdandi reglum.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

## 1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta uppskotið fevnir um tvær ymiskar broytingar, ið ikki eru tongdar at hvørjari aðrari. Broytingarnar eru um:

1. Eftirlønarviðbót til fólkapensjónistar, sum hava verið fyritíðarpensjónistar
2. Ein nágreining um, at pensjónistur, sum fær brotpensjón og hevur rætt til barnaviðbót, fær barnaviðbótina í somu brotum sum pensjónin.

Í viðmerkingunum hereftir verður ikki skilt ímillum fyritíðarpensjón og framskundaða pensjón. Tað merkir, at tá ið tað stendur "fyritíðarpensjón", so fevnir tað eisini um "framskundaða pensjón".

*Eftirlønarviðbót*
Flest allir føroyingar eru fevndir av løgtingslóg um eftirlønir (eftir hetta nevnd eftirlønarlógin), og flest allir føroyingar spara saman til egna eftirløn. Eisini eru allar uppihaldsveitingar á almannaøkinum við tíðini fevndar av eftirlønarlógini, og bundna eftirlønargjaldið er sostatt lagt aftrat almannaveitingunum. Fyritíðarpensjónistar eru sostatt einasti samfelagsbólkur, ið ikki sparir saman til egna eftirløn. Sambært samgonguskjalinum skulu fyritíðarpensjónistar fáa eftirlønarveiting.

*Barnaviðbót til brotpensjónistar*
Løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er ógreið í sambandi við rættindi til barnaviðbót til persón, ið fær brotpensjón.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*Eftirlønarviðbót*
Eftirlønarlógin var sett í gildi 1. januar 2014, sum áleggur føroyingum við fullari skattskyldu í Føroyum at spara upp til egna eftirløn. Bundna eftirlønargjaldið í 2014 var 1 prosent av A-inntøkuni. Bundna eftirlønargjaldið er hækkað stigvíst upp til 12 prosent í 2026. Endamálið við eftirlønarlógini er, at føroyingar í størri mun skulu fíggja sína pensjón, og útreiðslurnar til fólkapensjón sostatt skulu minka. Tá ið samansparingin til eftirløn veksur, fer fólkið sum frálíður at hava minni tørv á fólkapensjón frá tí almenna.

Fyrstu árini vóru almannaveitingar ikki fevndar av eftirlønarlógini, men við tíðini eru flestu almannaveitingar blivnar eftirlønargevandi. Bundna eftirlønargjaldið verður nú lagt aftrat hesum almannaveitingum:

- Arbeiðsbúgvingarveiting sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,
- Lønarískoyti til tillagað starv sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,
- Fyribils- og varandi uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og
- Dagpening vegna sjúku, sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

Útgjald sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er undantikið at rinda til bundna eftirlønargjaldið. Fyritíðarpensjón og fólkapensjón verður veitt við heimild í løgtingslóg um

almannapensjónir o.a., og fyritíðarpensjónistar spara sostatt ikki saman til eftirløn av sjálvari fyritíðarpensjónini.

Fyritíðarpensjón verður veitt í trimum pensjónsstigum, sum er hægsta-, miðal- og lægsta fyritíðarpensjón. Persónar við miðal- ella lægstu fyritíðarpensjón hava nakað av arbeiðsføri og kunnu tí eisini hava arbeiðsinntøkur aftrat pensjónini. Treytin fyri at fáa hægstu fyritíðarpensjón er, at persónurin ongan arbeiðsførleika hevur, og flestu persónar við hægstu fyritíðarpensjón hava sostatt onga arbeiðsinntøku aftrat pensjónini.

Fyritíðarpensjón kann eisini veitast vegna einkjustøðu. Talan er um persón við børnum yngri enn 18 ár, har hjúnafelagin doyr. Tann eftirsitandi hevur tá rætt til miðal fyritíðarpensjón inn til yngsta barnið er fylt 18 ár. Flestu persónar, sum fáa fyritíðarpensjón vegna einkjustøðu hava vanligar arbeiðsinntøkur, men fáa eisini lutvísa fyritíðarpensjón.

Hjá persóni við hægstu fyritíðarpensjón, sum ikki hevur spart saman til eftirløn, lækkar tøka inntøkan, tá ið hann flytur frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Tað ber ikki til at siga nakað eintýðugt um eftirløn hjá miðal- og lægstu fyritíðarpensjónistum, tí hesi spara saman av tí arbeiðsløn, sum er aftrat fyritíðarpensjónini.

Pensjónistar hava serligar skattatreytir, og fyritíðarpensjónistar, sum ikki hava aðrar inntøkur enn sosiala pensjón, rinda ikki lands- ella kommunuskatt.

**Pensjónsupphæddir um mánaðin í 2026 hjá pensjónisti uttan aðra inntøku enn almannapensjón, aftaná skatt og gjøld (útgjald frá AMEG er íroknað hjá fólkapensjónistum)**

| | *Støk* | *Gift* |
|---|---|---|
| *Hægsta fyritíðarpensjón* | 16.161 kr. | 13.622 kr. |
| *Miðal fyritíðarpensjón* | 13.338 kr. | 11.028 kr. |
| *Lægsta fyritíðarpensjón* | 13.294 kr. | 10.909 kr. |
| *Fólkapensjón* | 14.187 kr. | 12.278 kr. |

*Viðm.: roknað við miðal kommunuskattaprosentið í 2025*

Tey flestu, sum fáa játtað fyritíðarpensjón, hava eitt langt arbeiðslív aftanfyri seg. Eftirlønarlógin hevur bara verið í gildi í 12 ár, og enn er eftirlønaruppsparingin sostatt rættiliga lág. Men um nøkur ár fara tey flestu, sum seint í lívinum fáa játtað fyritíðarpensjón, at hava eina eftirlønarsamansparing. Tað eru nøkur, sum eru fyritíðarpensjónistar alt sítt vaksna lív, og hesi hava onga eftirlønarsamansparing.

Talvan omanfyri vísir m.a. inntøku hjá fólkapensjónistum, sum ikki hava aðra inntøku enn fólkapensjón og útgjald frá AMEG. Sum frálíður fara nærum ongir fólkapensjónistar einans at hava upphæddirnar í talvuni omanfyri, at liva av, tí føroyingar eru álagdir at spara upp til egna eftirløn.

Tað er sokallaða inntøkugrundarlagið, sum avgerð, hvussu høga almannapensjón ein pensjónistur hevur rætt til. Inntøkugrundarlagið eru tær inntøkur, sum pensjónisturin hevur aftrat sínari almannapensjón so sum arbeiðsinntøkur, kapitalinntøkur og útgjald sambært eftirlønarlógini. Ein pensjónistur við høgum inntøkugrundarlagi fær lægri pensjón enn ein persónur við lágum inntøkugrundarlagi. Sambært galdandi reglum lækkar fólkapensjón við 20 prosentum av inntøkuni, sum er hægri enn 61.900 kr. Ein persónur, sum t.d. fær útgoldið 6.000 kr. um mánaðin í lívrentu, sum er skattað við inngjald, hevur eina inntøku uppá umleið 19.700 kr. um mánaðin aftaná skatt og gjøld. Tað merkir, at við verandi lóggávu verður gjógvin størri

millum pensjónistin, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum, og pensjónistin, sum í sínum vaksna lívi hevur verið fyritíðarpensjónistur.

*Barnaviðbót til brotpensjónistar*
Rættindi til barnaviðbót hjá pensjónisti, sum býr uttanlands (uttanfyri danska ríkið), og sum fær føroyska brotpensjón, eru ikki nóg greið. Ásett er í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at barnaviðbót kann ikki veitast í brotum. Tað merkir, at antin verður full barnaviðbót veitt ella ongin barnaviðbót veitt.

Upprunaliga var ásetingin umsitin soleiðis, at fekk pensjónistur barnaviðbót í bústaðarlandinum, varð ongin barnaviðbót veitt úr Føroyum, tí so er talan um dupulttrygging. Ein kærunevndaravgerð broytti tó hesa siðvenjuna, og nú verður full barnaviðbót veitt úr Føroyum, hóast pensjónisturin eisini fær barnaviðbót í bústaðarlandinum. Í nøkrum londum verður barnaviðbót veitt í brotum, sum t.d. í Noregi, og tá er tað eitt ivamál, um viðkomandi skal hava fulla barnaviðbót ella onga barnaviðbót úr Føroyum.

Ásetingin um barnaviðbót til persón við brotpensjón ávirkar sera fáar persónar, tí tað er bert í undantaksførum, at ásetingin verður brúkt.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

*Eftirlønarviðbót*
Endamálið við eftirlønarviðbótini er at minka um munin á fíggjarligu umstøðunum hjá fólkapensjónistum, sum gjøgnum arbeiðslívið hava spart saman til egna eftirløn, og hjá fólkapensjónistum, sum hava verið fyritíðarpensjónistar. Við hesum uppskotinum fer ein fólkapensjónistur, sum hevur verið fyritíðarpensjónistur, at fáa eina eftirlønarviðbót aftrat pensjónini. Eftirlønarviðbótin, ið verður útgoldin mánaðarliga, hevur pensjónisturin rætt til, so leingi hann er á lívi.

Fíggjarligu umstøðurnar hjá fyritíðarpensjónistum eru ymiskar. Nøkur fáa tillutað fyritíðarpensjón, tá tey fylla 18 ár, meðan onnur hava eitt langt arbeiðslív aftanfyri seg og hava harvið eisini eftirlønarsamansparing, áðrenn fyritíðarpensjónin verður tillutað. Samansparing sambært eftirlønarlógini er tó enn avmarkað, tí eftirlønarlógin ikki var sett í gildi fyrr enn í 2014. Harumframt var tvungna eftirlønargjaldið eisini bert 1 prosent av útgoldnu lønini fyrsta árið og vaksandi við einum prosentstigi um árið inn til 2026, tá gjaldið er komið upp á 12 prosent.

Hetta uppskotið hevur við sær, at ein fyritíðarpensjónistur fær eitt slag av fiktivari pensjónssamansparing, svarandi til 12 prosent av tí, sum viðkomandi hevur fingið útgoldið í fyritíðarpensjón. "Pensjónssamansparingin" er nevnd útrokningarupphædd. Tá persónurin flytur frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón verður útrokningarupphæddin umroknað til eina mánaðarliga veiting, ið verður veitt so leingi, sum persónurin er á lívi.

Útrokningarupphæddin er sum nevnt 12 prosent av útgoldnari fyritíðarpensjón, men tað er ásett í uppskotinum, at tað er bara pensjón útgoldin frá 1. januar 2022, sum telur við í útrokningarupphæddini. Bundna eftirlønargjaldið sambært eftirlønarlógini byrjaði við 1 prosenti í 2014. Fyrstu árini vóru almannaveitingar ikki fevndar av eftirlønarlógini, men við tíðini eru flestu almannaveitingar blivnar eftirlønargevandi. Fleiri almannaveitingar blivu eftirlønargevandi í 2019 – tá við 5 prosentum. At hetta uppskotið ikki hevur somu prosenttøl sum eftirlønarlógin er fyri at gera skipanina einfaldari at umsita og lættari hjá borgarum skilja.

Í staðin fyri at brúka stigvaksandi samansparing er avgerð um at brúka 12 prosent síðani 1. januar 2022.

Eftirlønarviðbótin er ein kompensasjón fyri manglandi eftirlønarsamansparing í arbeiðslívinum. Hóast eftirlønarviðbótin er skipað við íblástri frá lívrentuháttinum, so er málið ikki, at veitingin skal vera meinlík eini lívrentu hjá einum pensjónsfelag.

Við hesum uppskotinum minkar munurin millum tey, sum spara saman sambært eftirlønarlógin og fyritíðarpensjónistar, sum ikki eru fevndir av eftirlønarlógini. Fyritíðarpensjónisturin fer fáa eina eftirlønarviðbót, tá hann verður fólkapensjónistur.

Fyrstu árini verður eftirlønarviðbótin rættiliga lág. Hetta er tí, at fyritíðarpensjón frá gamlari tíð ikki telur við í útrokningarupphæddini. Við tíðini fara eftirlønarviðbøturnar at blíva hægri, eins og pensjónin hjá teimum, sum spara saman eftir eftirlønarlógini eisini fer at vaksa við tíðini.

Ein stórur partur av fyritíðarpensjónistum fáa fyritíðarpensjón tillutað seint í lívinum, og tað merkir eisini, at hjá hesum eru tað bert fá ár, at tey ikki hava møguleika at spara saman til egna eftirløn. Tað merkir so eisini, at hjá teimum flestu verður eftirlønarviðbótin eisini rættiliga lág – eisini tá vit hyggja fram í tíð. Ein lág eftirlønarviðbót í framtíðini verður tí, at persónurin í stutta tí hevur verið fyritíðarpensjónistur.

Hyggja vit nógv ár fram í tíð, fer eftirlønarviðbótin hjá einum persóni, sum hevur verið fyritíðarpensjónistur ein stóran part av sínum vaksna lívi, at vera nakrar tús. kr. Og sambært verandi reglum við mótrokning fer ein persónur, sum fær eina høga eftirlønarviðbót, at fara upp í tøkari inntøku, tá hann flytur frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Men føroyska pensjónsskipanin sum heild er soleiðis skipað, at í framtíðini fer ein stórur partur av løntakarum upp í tøkari inntøku, tá tey gevast á arbeiðsmarknaðinum og blíva fólkapensjónistar.

Ein persónur, sum hevur verið fyritíðarpensjónistur síðani 1. januar 2022, og sum flytur til fólkapensjón 1. januar 2026 fær eina eftirlønarviðbót uppá umleið 476 kr. um mánaðin, svarandi til 5.706 kr. um árið. Tá ein persónur, sum hevur verið fyritíðarpensjónistur síðani 1. januar 2022, flytur til fólkapensjónistur í 2036, fær hann eina eftirlønarviðbót uppá umleið 1.750 kr. um mánaðin, svarandi til 21.000 kr. um árið (2026-satsur). Sum árini ganga fara tey, sum hava verið fyritíðarpensjónistar í nógv ár, at fáa eina hægri útrokningarupphædd og sostatt eisini at fáa hægri eftirlønarviðbót.

Eftirlønarviðbótin, sum verður útgoldin sum ein skattafrí veiting, telur við í inntøkugrundarlagnum, sum fólkapensjónin er grundað á. Tað merkir, at eins við og vanligari eftirlønarsamansparing sambært eftirlønarlógini kann tað ávirka upphæddina, sum verður veitt í fólkapensjón.

Tá ið ein persónur flytur frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, verður eftirlønarviðbótin ásett. Eftirlønarviðbótin hjá tí einstaka hækkar á hvørjum ári samsvarandi við javningarprosentinum, sum árliga verður ásett sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

*Barnaviðbót til brotpensjónistar*
Pensjónistur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, hevur rætt til eina barnaviðbót fyri hvørt barnið, men barnaviðbótin kann sambært galdandi lóg ikki veitast í brotum. Tað merkir, at pensjónistur, ið fær brotpensjón, antin fær fulla barnaviðbót ella onga barnaviðbót.

Løgtingslógin ásetir ikki, nær persónurin kann fáa fulla- ella onga viðbót. Við hesum uppskotinum verður ásetingin um, at barnaviðbót ikki verður veitt í brotum, strikað, og harvið verður lógin greiðari.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær tvær ymiskar broytingar, sum onki hava við hvørja aðra at gera.

1. Fólkapensjónistar, sum hava verið fyritíðarpensjónistar, fara at fáa eina eftirlønarviðbót saman við útgjaldi av fólkapensjón.

2. Ásetingin um, at barnaviðbót ikki kann veitast í brotum, verður strikað. Tað merkir, at ein persónur, sum fær brotpensjón, og sum hevur rætt til barnaviðbót, fer at fáa barnaviðbótina í somu brotum.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð lagt alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri tann XX. november 2025. Harumframt fingu hesi uppskotið til hoyringar:

Almannaverkið
Betri Pensjón
Brekumboðið
Fíggjarmálaráðið
Krabbameinsfelagið
Landsfelag Pensjónista
Lív
MEGD
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Sosialráðgevarafelagið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Skipanin við eftirlønarviðbót verður bert galdandi fyri tey, sum frameftir flyta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, og tí verða fíggjarligu avleiðingarnar fyrstu árini avmarkaðar.

Tað eru umleið 150 fólk um árið, sum flyta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Tað merkir, at tað í 2026 verða 150 pensjónistar, sum fara at fáa eftirlønarviðbót, og hesi fara í miðal at fáa viðbótina í 6 mánaðir. Í 2026 væntast útreiðslurnar til eftirlønarviðbót at vera umleið 350 tús. kr. og umleið 1 mió. kr. í 2027. Við støði í tali av fyritíðarpensjónistum í dag, og við støði í verandi reglum viðvíkjandi mótrokning, fer skipanin við eftirlønarviðbót um 40 ár at at kosta landskassanum umleið 15 mió. kr.

At pensjónistar, sum fáa føroyska brotpensjón, frameftir fara at fáa barnaviðbót í brotum hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar, tí tað er bert í undantaksførum, at hesi mál koma fyri.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær avmarkaðar umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið. Tað eru objektivar treytir, sum liggja til grund fyri rætti til eftirlønarviðbót, og Almannaverkið hevur allar neyðugar upplýsingar, sum skulu fáast til vega, tá eftirlønarviðbót skal setast á stovn. Tað eru umleið 150 fyritíðarpensjónistar, sum flyta til fólkapensjón um árið, og hjá hesum skal eftirlønarviðbótin roknast og ásetast. Pensjónisturin hevur rætt til eftirlønarviðbótina, so leingi viðkomandi er á lívi, og tí stendst ikki meira umsiting av eini eftirlønarviðbót, tá hon er sett í gongd.

Nakað av útreiðslum standast av tillagingum í KT-skipanini hjá Almannaverkinum.

Broytingin viðvíkjandi barnaviðbót til pensjónistar við brotpensjón viðvíkur bert einstøkum málum, og í hesum málum verður lógin greiðari og einfaldari at umsita.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur við sær jaligar avleiðingar fyri fólkapensjónistar, føddir aftaná 30. juni 1958, sum hava verið fyritíðarpensjónistar. Hesi fara at fáa eina eftirlønarviðbót aftrat fólkapensjónini, sum kompensasjón fyri manglandi eftirlønarsamansparing. Sostatt minkar munurin á inntøkuni hjá fólkapensjónistum, sum hava verið á arbeiðsmarknaðinum og spart saman til eftirløn og fólkapensjónistum, sum hava verið fyritíðarpensjónistar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið um eftirlønarviðbót hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
1) **Hoyvíkssáttmálin**
Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
Uppskotið verður ikki mett at stríða ímóti Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

#### Til § 1

*Til nr. 1*
Eftirlønarviðbót verður sett inn sum ein nýggj viðbót.

*Til nr. 2 (§ 12 c)*
*Stk. 1*
Sambært stk. 1 verður eftirlønarviðbót veitt fólkapensjónisti føddur aftan á 30. juni 1958, sum áður hevur fingið pensjón sambært § 2, stk. 1, nr. 2-5.

§ 2, stk. 1, nr. 2-5 er:
2) framskundað pensjón
3) hægsta fyritíðarpensjón
4) miðal fyritíðarpensjón
5) lægsta fyritíðarpensjón

Ásetingin merkir, at persónur, sum røkkur fólkapensjónsaldri, sum hevur móttikið fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, kann fáa eftirlønarviðbót. Eisini persónur, sum hevur fingið fyritíðarpensjón vegna einkjustøðu, hevur rætt til eftirlønarviðbót.

Tað verður víst til pensjón sambært § 2, stk. 1, nr. 2-5. Tað merkir, at tað er einans fyritíðarpensjón og framskundað pensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., sum telur við í útrokningarupphæddini. Útlendskar fyritíðarpensjónir skulu sostatt ikki teljast við í útrokningarupphæddina – heldur ikki danskar ella grønlendskar fyritíðarpensjónir.

Tað er bara fólkapensjónistur, føddur aftaná 30. juni 1958, ið hevur rætt til eftirlønarviðbót. Í praksis merkir tað, at bara tey, sum røkka fólkapensjónsaldri aftaná ársskiftið 2025/26, kunnu fáa eftirlønarviðbót.

*Stk. 2*
Eftirlønarviðbót er partur av fólkapensjónini og verður útgoldin saman við fólkapensjónini. Tað merkir, at ein persónur, sum útsetir sítt pensjónsútgjald, sambært kapitli 3 a í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., ikki fer at fáa eftirlønarviðbót, meðan pensjónin er útsett. Tað er ikki vanligt, ella sannlíkt, at ein fyritíðarpensjónistur útsetir pensjónsútgjaldið, men spurningurin kann vera viðkomandi hjá einum persóni, sum hevur fingið fyritíðarpensjón vegna einkjustøðu.

*Stk. 3 og 4*
Stk. 3 og 4 áseta, hvussu eftirlønarviðbótin verður roknað og ásett. Fyrst verður roknað ein útrokningarupphædd (stk. 4), sum er 12 % av útgoldnari fyritíðarpensjón og framskundaðari pensjón síðani 1. januar 2022. Tað skal skiljast soleiðis, at tað er fyritíðarpensjón, sum sambært løgtingslógini er útgoldið galdandi aftur til 1. januar 2022. Eftirrokningar, sum eru avgreiddar í 2022 ella seinni, sum eru fyri árini áðrenn 2022, telja ikki við í útrokningarupphæddini. T.d. ein upphædd, sum er útgoldin til ein fyritíðarpensjónist í 2022, men sum er galdandi fyri 2021, telur ikki við í útrokningarupphæddini.

Í 2022 var fyritíðarpensjón útgoldin frammanundan, og pensjónsútgjaldið fyri januar 2022 varð sostatt útgoldið í desember 2021. Men útgjaldið er fyri januar 2022 og telur tí við í útrokningarupphæddini.

Tað er bara útgoldnar upphæddir, sum telja við í útrokningarupphæddini. Tað eru dømi um, at útgjald av pensjón ikki byrjar samstundis, sum fyritíðarpensjónin er játtað frá. Men tá hevur pensjónisturin móttikið aðra almannaveiting í staðin. Tað er ásett í § 32, stk. 2 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at um umsøkjari hevur fingið aðra almannaveiting, meðan málið er viðgjørt, verður pensjón kortini ikki veitt fyrr enn frá 1. í mánaðinum eftir, at veitingin er steðgað. Aðrar almannaveitingar eru fevndar av eftirlønarlógini.

Tað er bara grundupphædd, viðbót, avlamisviðbót og eyka viðbót, sum í hesum sambandi er at rokna sum pensjón. Tað merkir sostatt, at barnaviðbót, hjálparviðbót, røktarviðbót og persónligar viðbøtur ikki skulu roknast uppí útrokningarupphæddina.

Árliga eftirlønarviðbótin er útrokningarupphæddin deilt við 15.

***Dømi***: Ein stakur persónur, sum hevur fingið hægstu fyritíðarpensjón í tíðarskeiðinum 1. januar 2022 til 31. des. 2025, skal hava eftirlønarviðbót frá 1. januar 2026. Eftirlønarviðbótin verður roknað, sum 12% av samlaðu upphæddini, sum er útgoldin fyri tíðarskeiðið januar 2022 – desember 2025 deilt við 15.

- Samlað upphædd (grundupphædd, viðbót og avlamisviðbót) fyri árini 2022 til 2025 er umleið 713.000 kr.
- Útrokningarupphæddin er 12 % av 713.000 kr., svarandi til umleið 85.600 kr.
- Árlig eftirlønarviðbót er útrokningarupphædd deilt við 15 (85.600/15), sum er 5.700 kr. um árið, svarandi til 475 kr. um mánaðin.

Leisturin er gjørdur við íblástri frá háttinum, sum ein lívrenta verður roknað. Væntað livitíð er grundarlagið, tá lívrenta verður ásett. Væntað livitíð hjá einum 67 ára gomlum føroyingi er sambært Hagstovu Føroya umleið 19 ár. Í hesum uppskotið er 15 sett sum grundarlag. Tað eru ikki útrokningar ella metingar, sum liggja til grund fyri talinum 15. Eitt lægri tal gevur hægri eftirlønarviðbót, og tað er eitt politiskt val at áseta talið lægri enn væntað livitíð.

Tað finnast ikki neyv hagtøl um væntaða livitíð hjá 67 ára gomlum fyritíðarpensjónistum, og tað eru heldur ikki útlendskar kanningar, sum kunnu brúkast sum grundarlag.

Eftirlønarviðbótin hjá hvørjum einstøkum fólkapensjónisti verður ásett fyrstu ferð fólkapensjón verður útgoldin. Stk. 3 ásetir, at eftirlønarviðbótin verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Hetta skal skiljast soleiðis, at eftirlønarviðbótin hjá hvørjum einstøkum pensjónisti, verður javnað árliga við prosentsatsinum, sum verður lýst í kunngerð á hvørjum ári.

Eftirlønarviðbótin verður javnað 1. januar uttan mun til, um hon upprunaliga er ásett fyrst ella síðst í árinum.

Stk. 5 ásetir, at eftirlønarviðbótin verður útgoldin mánaðarliga.

*Til nr. 3*
Ásetingin um, at barnaviðbót ikki kann veitast í brotum, verður strikað. Tað merkir, at frameftir fer ein pensjónistur, ið fær brotpensjón, eisini at hava rætt til barnaviðbót í somu brotum, sum pensjónin verður veitt.

*Til nr. 4*
§ 18, stk. 3 ásetir, at avlamisviðbót, barnaviðbót, hjálparviðbót, røktarviðbót og avlamisveiting ikki er roknað eftir inntøku. Eftirlønarviðbót verður við hesum uppskoti eisini fevnd hesi ásetingini.

Við inntøku er at skilja inntøkur, ið eru fevndar av inntøkugrundarlagnum, sambært § 20 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. T.v.s. inntøkur, sum pensjónisturin hevur samstundis sum viðbótin verður veitt. Ásetingin hevur sostatt onki við § 1, nr. 2 at gera, sum merkir, at eftirlønarviðbótin upprunaliga verður ásett sum 12 prosent av útgoldnari fyritíðarpensjón – t.v.s. fyritíðarpensjón útgoldin áðrenn viðkomandi er blivin fólkapensjónistur.

*Til nr. 5*
Ásetingin merkir, at útgoldin eftirlønarviðbót telur við í inntøkugrundarlagnum sambært § 20 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Nógvir fyritíðarpensjónistar hava eitt langt arbeiðslív aftanfyri seg og fara í framtíðini harvið eisini at hava eina eftirlønarsamansparing, áðrenn fyritíðarpensjónin er tillutað. Hetta er eftirlønarsamansparingar, sum verða partur av inntøkugrundarlagnum, sum ásetingin av pensjón verður grundað á. Frameftir verður eftirlønarviðbótin sum nevnt eisini partur av inntøkugrundarlagnum.

**Til § 2**
Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Broytingin viðvíkjandi eftirlønarviðbót hevur tó virknað frá 1. januar 2025. Í praksis merkir tað, at fyritíðarpensjónistar, sum aftaná 2025 flyta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, fáa rætt til eftirlønarviðbót. Hetta er í samsvar við § 1, nr. 2, sum ásetir, at bert persónur føddur aftaná 30. juni 1958 hevur rætt til eftirlønarviðbót.

Broytingin viðvíkjandi barnaviðbót verður bert galdandi fyri nýggjar pensjónistar. Ein persónur, sum hevur fingið játtað fulla barnaviðbót sambært higartil galdandi reglum varðveitir rættin til fulla barnaviðbót.

Almanna- og mentamálaráðið, 28. november 2025

**Eirikur í Jákupsstovu**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3:
Fylgiskjal 4: